# Útibarnagarður í Haraldssundi

**Í januar letur Klaksvíkar kommuna í samstarvi við Kunoyar kommunu upp ein útibarnagarð, sum skal halda til í bygdarhúsinum í Haraldssundi. Stovnurin verður undir dagstovninum Mylnuhúsið í Klaksvík og kemur í fyrstu atløgu at hýsa 20 børnum**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Mylnuhúsið fer framyvir eisini at umfata ein útibarnagarð í Haraldssundi. Hanna Thøgersen, leiðari, heldur hetta vera eitt gott og stuttligt høvi hjá børnum úr Klaksvík til at koma út á bygd*

**Klaksvík:**
Um hálvan januar letur ein útibarnagarður upp í bygdarhúsinum í Haraldssundi. Stovnurin er eitt úrslit av eini samstarvsavtalu millum Klaksvíkar kommunu og Kunoyar kommunu.

Nýggi stovnurin kemur at taka 20 børn, sum skulu verða fylt fimm ár. Men leiðarin í Mylnuhúsinum, Hanna Thøgersen, sigur, at tey fara at byrja spakuliga.

– Í fyrstu atløgu fara vit bert at taka børn inn, sum skulu í skúla í summar. Í Mylnuhúsinum ganga átta børn, sum skulu í skúla í summar. Umframt at børn úr Kunoynni eisini koma at ganga har, greiðir Hanna frá.

Hon er nakað varin við at siga nakað nágreiniligt um nýggja stovnin, tí avtalan kom í lag fríggjamorgunin, so tað er avbera feskt enn.

Trý starvsfólk koma at arbeiða á stovninum fulla tíð, og sum sagt kemur stovnurin at hýsa 20 børnum. Men Hanna Thøgersen sigur, at tað verða ikki 20 frá fyrsta degi av. Nær væntast kann, at øll 20 børnini vera har, veit hon ikki at siga, sum nú er.

## Gott hugskot

Hanna Thøgersen letur væl at hugskotinum við at lata upp útibarnagarð á bygd.

– Eg síggi upp á hetta soleiðis, at tað er stuttligt, at nøkur børn úr ein lítlum býi, sum Klaksvík, fáa møguleika til at sleppa á bygd. Bygdarlívið fer uttan iva at geva hesum børnunum nakað, sum vit eru farin frá í Klaksvík. Og haraftur-at haldi eg, at tað er stuttligt at smábygdirnar verða nýttar til slíkt, tí hetta fer uttan iva at seta gongd í bygdarlívið í Haraldssundi framyvir, sigur Hanna.

Hon hevur somuleiðis fingið ta fatan, at fólk í Haraldssundi gleða seg til stovnurin letur upp hálvan januar.

Orsøkin til tað er, at tá fyllir Mylnuhúsið fimm ár. Og heldur Hanna, at tað er eitt serstakt høvi til at lata útibarnagarðin upp til.

Við teimum 20 børnunum í Haraldssundi kemur tali á børnum, sum hoyra til dagstovnin Mylnuhúsið upp á 148 børn. Tey eru í øllum aldri heilt frá vøggustovu og til og við annan flokk, tí frítíðarskúlin hoyrir eisini undir stovnin.

Hanna stúrir tó ikki fyri, at stovnurin er við at gerast ov stórur.

– So longi sum vit kunnu varðveita smáu eindirnar, so trúgvi eg ikki, at tað bilar nakað, um fleiri børn leggjast afturat, sigur hon.

## 50 børn bíða

Tá hesi 20 børnini eru byrjað í nýggja útibarnagarðinum, standa eini knapt 50 børn eftir á bíðilista í Klaksvík, sambært Eyðgunn Samuelsen, forkvinnu í Sosialu nevnd í Klaksvíkar Býráð.

Fyrr í ár segði hon, at tey væntaðu, at bíðilistin fór at vera burtur við árslok ella at talan bert fór at verða um nøkur heilt fá. Men nú er greitt, at soleiðis verður ikki. Tað standa sum sagt 50 børn á listanum enn, og tey mugu bíða nakað enn.

– Tað eru komin fleiri børn afturat listanum enn, vit høvdu væntað fyrr í summar, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Barnaansingin í Klaksvíkar kommunu er vorðin ein rættuliga stórur postur á fíggjarætlanini við, at kostnaðurin er komin upp á 25 milliónir krónur. Inntøkurnar hjá kommununi liggja um 110 milliónir.

Klaksvíkar kommuna hevur sett 1,7 milliónir krónur av til barnaansing í 2004, og stovnurin í Haraldssundi kemur bert at kosta um helmingin av tí, so tað fer at koma okkurt tilboð afturat komandi ár, sigur Eyðgunn, sum er sera spent uppá, hvussu ætlanin um nýggja stovnin í Haraldssundi fer at verða móttikin.




# Handtøkan av Saddam ávirkaði virðisbrøv

MARKNAÐARRÁK

Sunnudagin varð fyrrverandi irakiski einaræðisharrin Saddam Hussein tikin til fanga av amerikonskum hermonnum. Hendingin hevur fingið ávirkan á marknaðirnar og mánamorgunin styrknaði dollarin um _% samstundis sum bæði partabrøv og lánsbrævarentur sum heild hækkaðu. Mett verður at hendingin kann ávirka virðisbrævamarknaðirnar nakrar dagar, men so vilja grundleggjandi búskaparligu viðurskiftini aftur koma í sjóneykuna. Á fundi hjá FED í farnu viku, var leiðandi rentan í USA ikki broytt, og endurtikið varð, at stigið á leiðandi renturni verður lágt leingi enn. Áhugavert er kortini, at óttin um vantandi prísvøkstur nú er minkaður. Hetta fekk lánsbrævarentur, eisini um okkara leiðir, at hækka. Við broyttu prísvakstrarvæntanunum verður mett, at FED ger marknaðin til reiðar til eina rentuhækking; ein slík verður tó ikki at síggja fyrr enn væl er liðið av 2004.

Fundarfrásøgn frá oktoburfundinum hjá FED, ávirkaði eisini í farnu viku, hóast talan er um gomul tíðindi, við støði í vitan frá septembur. Á hesum fundinum var FED ikki eins bjartskygd sum nú. Av tí at nýggjari vitan er tøk, metur Marknaðarrák, at fundarfrásøgnin ikki átti at ávirka.

Fríggjadagin komu tíðindir um, at Vestas Wind Systems hevur ætlanir um at keypa hin danska vindmylluframleiðaran NEG Micon. Orsøkin til ætlanina er at lækka um framleiðslukostnaðin og at forða, at aðrir kappingarneytar keypa NEG Micon. Áðrenn eina samanlegging er Vestas longu heimsins størsti vindmylluframleiðari og keypið økir sostatt um støðdarleiðsluna. Hetta er positivt fyri samanlagda felagið, ið virkar í einari vinnu við sera harðari kapping. Kostnaðurin fyri NEG Micon verður 2,5 mia kr.

Dollarin hevur veruliga verið á andgletti farnu vikurnar. Væntandi verður dollarin eisini stórt evni týsdagin, tá amerikonsk gjaldsjavnatøl verða kunngjørd. Um gjaldsjavnahallið økist, kann trýstið á dollaran økjast, og hetta kann føra við sær, at renturnar um okkara leiðir aftur lækka. Dollarin hevur framvegis stóra ávirkan, og týsdagin kann hesin gerast skiftandi soleiðis, at eisini virðisbrævamarknaðirnir gerast skiftandi.

Nú farið er inn í seinastu heilu arbeiðsvikuna av 2003 er sannlíkt, at marknaðirnir hesar seinastu dagarnir av árinum vera merktir av hesum. Somuleiðis kunnu tíðindi um, hvat henda skal við Saddam Hussein, ávirka

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,86% | -0,04% |
| 5 ára lánsbræv | 3,71% | -0,04% |
| 10 ára lánsbræv | 4,51% | -0,02% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 246,7 | 2,8% |
| OMX, Svøríki | 622,5 | 1,0% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.622,7 | 1,9% |
| S&P 500, USA | 1.074,1 | 0,5% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,98 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 163,70 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 72,20 | -0,3% |
| Altjóða Partabrøv | 71,60 | 0,1% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 608,42 | -0,1% |
| EUR | 743,96 | -0,1% |
| GBP | 1.060,42 | 0,4% |
| NOK | 90,76 | -0,8% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru ˙troknaðar í mun til fyri viku síðan.*





*Fær SEV loyvi frá landinum, verður aftur farið inn í fjøllini í Eysturoynni at bora fyri vatninum, sum skal førast úr áunum og til Eiðisvatn. (Savnsmynd)*

# EIÐI-2 sett aftur á sporið

**Umboðsnevndin hjá SEV hevur sett EIÐI-2 verkætlanina aftur á sporið. Fríggjadagin varð játtað, at SEV-stýrið biður um 150,6 milliónir krónur til at føra vatnorkuútbygginga í Eysturoynni suður ímóti Selatrað. Formaðurin í umboðsráðnum vísir aftur, at hetta er hent í tí dulda**

VATNORKA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Gongur sum SEV ætlar verður aftur farið undir at grópa seg ígjøgnum Eysturoynna fyri at taka áir. Hesaferð á vestursíðuni.

Umboðsnevndin hjá SEV hevur samtykt at geva stýrinum fyri SEV loyvi til at læna 150,6 milliónir krónur til verkætlanina EIÐI-2. Tað var greitt fríggjakvøldið, tá umboðsráðið fyri SEV helt fund á Hotel Hafnia. 54 atkvøddu fyri og 11 atkvøddu ímóti uppskotinum at heimila stýrinum at taka upp lán. Frammanundan høvdu 20 atkvøtt fyri at útseta málið, men tað fall.

Verkætlanin fevnir um at gera tunlar í fjallinum í Eysturoynni frá Svínáum til og við Sandá á Veðranesi. Tað er hetta, sum tær 150 milliónir krónurnar skulu lænast til. Harafturat hevur umboðsnevndin eisini mælt stýrinum til, at loyvið fæst til framhaldandi útbygging frá Sandá til Gjógvará á Selatrað. Tunlarnir skulu taka vatnið í áunum og føra tað til Eiðisvatn, haðani tað fer í vatnorkuverkið.

## Einki endaligt

Hans Tausen Olsen, formaður í Umboðsráðnum hjá SEV, ger vart við, at talan er ikki um eitt endaligt loyvi at fara í gongd. Fyrst skulu neyðug loyvi fáast frá bæði friðingar- og landsmyndugleikum.

Friðingarmyndugleikarnir, tað eru yvirfriðingarnevndin, friðingarnevndin og hagin, skulu geva loyvi til sjálva boringina í fjallinum og at taka áirnar. Landsstýrið skal geva SEV loyvi til at upptaka lán.

– Fáa vit eitt nei, so verður sjálvandi einki bygt. Men vit mugu geva loyvi fyrst, tí hvat skal SEV annars biða um loyvi til?, spyr Hans Tausen Olsen.

## Pressan svav

Ein afturvendandi atfinning ímóti SEV er, at stovnurin er so afturlætin, hóast avgerðirnar raka allar føroyingar. Fýlst verður á, at kjakið um so stórar verkætlanir sum Eiði 2, ikki gongur fyri seg í fólkinum men handan stongdar dyr hjá SEV.

Hesar atfinningar er Hans Tausen Olsen harmur um. Hann heldur seg hava gjørt sítt til at kunna fólk og fjølmiðlar, og hann heldur pressuna hava snorksovið í tímanum. Málið hevur verið fimm ferðir fyri, sigur hann, og tann 19. juni í ár bjóðaði hann fjølmiðlunum til ein kunnandi fund, men eingin møtti.

– Eg skal viðganga, at eg var ógvuliga skuffaður. Eg havi fingið skotið í skógvarnar, at SEV er ov afturlætið, og tí gjørdi eg mær stóran ómak við einum kunnandi fundi. Vit høvdu fingið okkum útlendska hjálp at greiða frá um biogass, aldu-, vind-, vatn og sólorku og enntá samskifti á elkervinum. Men eingin møtti frá pressuni, og tí er millum lítið og einki komið út. Talan var um eina stóra kunning um alla orkuútbygging í Føroyum, sum eisini EIÐI-2 er partur av, sigur Hans Tausen Olsen.

Fundurin fríggjadagin var sum vant afturlætin, men tað fekk umboðsnevndarformaðurin einki gjørt við. Hann roknar tó við, at hetta verður broytt í mai í ár, tá ið uppskot verður lagt fram um, at fundirnir hjá umboðsráðnum vera almennir.

## Eingin árinskanning

Tað er greitt, at tað hevur ávirkan á firðirnar, tá ið stórar áir, sum streyma á sjógv, verða tiknar til vatnorku. Ongar árinskanningar eru enn gjørdar av EIÐI-2 verkætlanini, sum nú verður sett á sporið aftur. Hans Tausen Olsen vísir á, at tað ikki er SEV, sum skal standa fyri árinskanningum, men hevur játtað at gjalda fyri tær.

– Tað er torført at gera árinskanningar áðrenn eina verkætlan fyri nakað, sum hendir aftaná. Vit gera tað, sum vit vera biðin um, men tað hevði verið meiningsleyst, um SEV sjálvt skuldi staðið fyri árinskanningum, sigur Hans Tausen Olsen.

# Sverre Midjord stríðist fyri løgmanssessi

**70 ára gamli Sverre Midjord stillar enn einaferð upp fyri Javnaðarflokkin í Suðuroy. Á seinasta vali var hann bara tríggjar atkvøður frá at taka sessin frá Henriki Old**

VAL 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

– Tað er so stutt fráliðið síðan síðsta val, so eg taki eitt tørn afturat. Vóru fýra ár gingin, so stillaði eg ikki upp, sigur Sverre Midjord.

Eftir síðsta val vóru boðini frá Sverra Midjord av Tvøroyri annars greið. Hann stillaði ikki uppaftur, tí nú var hann vorðin ov gamal. Men Sverre, sum er fyltur 70 ár, er enn einaferð á listanum hjá Javnaðarflokkinum í Suðuroy, og mikudagin verður endalig avgerð tikin á síðsta uppstillingarfundinum.

Sverre var bara tríggjar atkvøður frá at sleppa á løgting seinast. Henrik Old, sum varð valdur fyri Javnaðarflokkin, fekk 245 akvøður, og Sverre Midjord fekk 242. Men tað er ikki, tí hann ætlar sær at stjala sessin frá Henriki, at hann stillar upp.

– Sambandsflokkurin hevur einki boð upp á løgmann, hava teir sjálvir viðgingið. Eg haldi, at okkara formaður, Jóannes Eidesgaard, er eitt sera gott boð upp á ein løgmann, og tí stilli eg upp. Valið í Suðuroy verður avgerandi, og eg vil hjálpa til, at vit sleppa í landsstýri og fáa løgmann. Eg havi nógvar persónligar atkvøður. Veri eg ikki við, so fara tær helst nógvar til Sambandsflokkin, sigur Sverre Midjord.

Spurdur, um hann er farin at reka, svarar hann kvikur:

– Tað geri je alt árið. Her suðuri eru okur altíð í kontakt við veljaran, sigur Sverri Midjord.